# Seglvirkið á Skála

**Á gamla »planloftinum» á Skála Skipasmiðju, heldur Aðalstein Magnusson til við seglvirki sínum, Norðsegl. Tað eru einans tríggir útbúnir seglmakarar í Føroyum**

SEGLVIRKI
Rúna Sivertsen
runa@sosialurin.fo



*Á gamla »planloftinum« á Skála Skipasmiðju, heldur Aðalstein Magnusson til við seglmakaravirki sínum. Tað er nærum bert hugflogið, ið setir markið fyri, hvat ein seglmakari kann gera. Eitt nú hevur Aðalstein seymað hoppiboyur, og hesar eru sterkari enn tær útlendsku, sigst*

*Mynd: Maria Olsen*

Hevur tú ein bonk, ið treingir til nýtt betrekk, ella hevur tú brúk fyri eini hoppiboyu, so er bara at ringja til Aðalstein Magnusson.

Á »planloftinum« á Skála Skipasmiðju, heldur hann til við seglmakaravirki sínum, og tað er nærum bert hugflogið, ið setir markið fyri, hvat ein seglmakari kann gera.

Í løtuni ger hann eitt slag av klipsum fyri MBM. Tey skulu brúkast at heingja spjøldrini í, sum seyðurin verður merktur við.

Eftir at hava arbeitt á seglhúsinum í Klaksvík í nógv ár, fór Aðalstein til Danmarkar í seglmakaralæru. Hann varð avlærdur í 2000 og hevur síðani tá arbeitt á Skála, har hann eisini tekur eina hond í á skipasmiðjuni, tá lítið er at gera á seglvirkinum.



*Aðalstein seymar síðugardinur til trailarar, sóltjøld til handilsgluggar, loðsleytarar, bjargingarbeltir og mangt annað. Eisini ber til at bíleggja handseymaðar heingikoyggjur frá Norðsegl á Skála*

*Mynd: Maria Olsen*

## Stórt »Net-Party« tiltak í Handilsskúlanum

**Fríggjadagin 21. februar til mánadagin 23. februar verður »Net-Party« í Handilsskúlanum í havn**

»NET-PARTY«
*Andreas Dalsgaard*
*andreasbacon@hotmail.com*

»Net-party« er ikki nakað vit føroyingar kenna so nógv til, men tað er nakað, sum 2.HHA í Handilsskúlanum í Havn ætlar at broyta uppá. Tey skulu á námsferð, og tað krevur pengar. Man kann selja lutaseðlar... men tað er eitt sindur óintersant halda tey, og eingin tímir ordiliga at selja lutaseðlar. So tey fara at hava eitt »net-party«. Tað er nokk meira áhugavert enn at ganga runt og selja lutaseðlar í hesum regninum. Og so fáa tey høvi at nýta tað tey hava lært í handilsskúlanum um marknaðarføring og tílíkt. Og um alt gongur sum tað skal, so fara tey tveyogtjúgu ungfólkini til Malta síðst í mars.

»Ping«, sum tiltakið verður rópt, er skipað soleiðis, at ein einstakur persónur hevur egna teldu við, sum verður íbundin í eitt netverk, síðani kanst tú spæla spøl ella tílíkt ímóti øllum, sum eru íbundin til hetta netverkið. Skipað verður síðani fyri kappingum í ymsu spølunum og vinningar verða so til vinnararnar. Kappast verður í vælkenda og vælumtókta Counter strike, har lið verður gjørt við fimm fólkum, ímóti einum øðrum liði við fimm persónum, Unreal Tournament 2003, har ein spælur sjálvstøðugt ímóti øllum hinum, og síðani góði gamli klassikarin Star Craft, sum nokk er best umtókta strategi-spæl sum er.

Spælt verður eisini bara fyri stuttleikar. Spøl kunnu vera nevnd sum til dømis, Battlefield 1942 og C&C Generals, og tað, ið ein kemur í tankar um. Aldursmarkið er sett á fjúrtan ár, tí nøkur spøl hava aldursmark har umleið. Tey vænta, at 150-200 fólk koma til Ping, og at aldursbólkurin verður heilt frá fjúrtan til umleið fimmogtjúgu, men øll eru vælkomin.

Ping verður bert einaferð fyriskipað av 2.HHA, men Rani Nolsøe, sum er ein av fyriskiparunum, sigur, at hann ætlar at taka yvir aftaná, sum eitt meir ella minni regluligt virksemi.

Tiltakið byrjar 21. februar og endar 23. februar, og verður opið allatíðuna, so ein kann koma tá einum listir. Kantina verður á staðnum, so høvi verður at keypa sær okkurt leskiligt, afturvið spennandi spølunum. Fyrireikararnir bjóða øllum at koma niðan at hava eitt »mega feitt« vikuskifti, har tú kemur at hava hugnaligar løtur saman við ungfólki. Høvðusstuðul er Faroedane, og Litaval hevur eisini stuðlað við vinningum.

## Opið hús á Húsarhaldsskúlanum

**Skeiðið á Húsarhaldsskúla er komið at enda á hesum sinni, og sum vanligt er, endar tað við einari stórari framsýning á skúlanum**

FRAMSÝNING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Framsýning verður á Húsarhaldsskúla Føroya týsdagin 17.02. frá klokkan 16 til 21*

**Klaksvík:**
Opið hús og kafé verður á Húsarhaldsskúla Føroya í dag, týsdagin. Næmingar sýna fram allir lutir, sum tey hava gjørt hetta seinasta góða hálva árið, og tað plagar at vera ein avbera spennandi og fjølbroytt framsýning. Næmingarnir hava fingið undirvísing í nógvum handaligum lærugreinum umframt matgerð og reingerð. Undirvíst hevur verið í hondarbeiðslærugreinunum, binding, hekling, tilskering, seyming, silkimáling, brodering, føroysk bond og ullarbeiði. Og tey hava fingið væl burturúr.

Saman við framsýningini bjóða næmingarnir eisini ein kaffimunn, sum siður er. Har ber til at fáa onkrar køkur afturvið, sum næmingarnir sjálvir hava bakað.

Frá Húsarhaldsskúlanum verður sagt, at framsýningin letur upp klokkan 16 og er opin til klokkan 21.



# Kvøldseta í Leirvík

*Gamli skúli í Leirvík*



**Hóskvøldið skipar fornminnisfelagið fyri kvøldsetu í Bygdarhúsinum**

FORNMINNI
*Fornminnisfelagið í Leirvík*

Hóskvøldið 19. februar kl. 19.30 skipar Fornminnisfelagið í Leirvík fyri kvøldsetu í Bygdarhúsinum í Leirvík.

Kvøldsetan verður skipað á sama hátt sum tær undanfarnu, sum hava verið í Bygdarhúsinum. Talan verður um felagssang, kaffi og nakrir persónar fara at greiða frá ymiskum, bæði viðvíkjandi bygdini og eisini øðrum.

M. a. fer landsantikvarurin, Steffen Stummann Hansen, at greiða frá og vísa myndir frá útgrevstrinum á Toftanesi. Kommunulæknin, Gunnar Bjørkmann, fer at hugleiða um ymist, og Hákun Andreasen fer at greiða frá virksemi Fornminnisfelagsins, og hvørjar ætlanir eru við Gamla skúla.

Tiltakið er ókeypis, og vónar Fornminnisfelagið at fólk møta fjølment. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Høgni, Ian og Florence eiga nú Jinx

**Café'in í blómuhandlinum á Áarvegnum hevur nú tríggjar eigarar**

CAFÉ

Gallarí Jinx, skeinkistað og matstova, sum seinasta summar læt upp í hølunum hjá blómuhandlinum hjá Trónd Hansen á Áarvegnum í Havn, hevur nú fingið nýggjar eigarar.

Tað var Florence á Skipagøtu, sum setti á stovn Gallarí Jinx. Nú hevur hon kortini fingið tveir eigarar afturat sær, teir eru Ian Skylv Hansen og Høgni Hansen.

Í november fóru tey á Jinx at savna pening til buss til búfólkið á Eirargarði 16A. Henda innsavning hevur givið góðar 7.000 kronur.

Av Gallarí Jinx siga tey, at innsavningin heldur fram eina tíð afturat – og vóna tey at kunna geva búfólkunum eitt gott ískoyti tið keypið av bussinum.

## Munnligir fyrispurningar á tingi

TINGFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í morgin, mikudagin kl 13:30 verður fjórði tingfundurin hjá nýggja løgtinginum. Skráin er ikki av teimum drúgvu, einans munnligir fyrispurningar eru á skránni, umframt framløgu, sum altíð er síðsta punkt á skránni.

Munnligir fyrispurningar – sum eru fyrispurningar, ið tingmenn kunnu seta landsstýrismonnum og løgmanni – skulu verða løgtingsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi kl 12 dagin fyri tingfundin.

## Býlingshúsið í Maritugøtu er reist

**Í Havn ætla tey, at barnaansingartørvurin skal verða nøktaður fyri kommunuvalið í vetur**

BARNAANSING
*Eirikur Lindenskov*



Í síðstu viku var enn ein dagstovnur reistur í Tórshavnar kommunu. Býlingshúsið í Maritugøtu skal hýsa 32 barnagarðsbørnum og 12 vøggustovubørnum.

Býlingshúsið er 534 bruttofermetrar.

Guttesen og Staksberg P/F standa fyri byggingini av býlingshúsinum, ið skal standa klárt hálvan august.

Tórshavnar kommuna hevur sett sær fyri at nøkta tørvin á barnaansingarplássum í hesum valskeiðinum, og Býlingshúsið í Maritugøtu er ein av teimum stovnunum sum verður bygdur í ár.

Eisini verða dagstovnar bygdir við Landavegin, Sundsvegin og á Løkjutúni.

## Fríggjakvøldið fara tey ungu á Platform

**Komandi fríggjakvøld verður ungdómsdiskotek á Platform**

UNGDÓMUR
*Tíðindaskriv*

7. b í Tórshavnar kommunuskúla skipar fyri ungdómsdiskoteki á Platform komandi fríggjakvøld. Fyri at fáa rætta diskoteksumhvørvi, hevur flokkurin við foreldrabólkinum á odda, leigað Platform. Nú hava tey ungu, sum vanlig vikuskifti ikki sleppa inn í Platform orsakað av aldursmarki, høvi at koma á eitt rættiligt diskotek.

Endamálið er at savna pening til námsferð hjá flokkinum. Farið verður á Hvítusunnu og gongur leiðin til Aberdeen. Hetta er sera mennandi fyri áhugan í enskum hjá flokkinum. Eisini skapar hetta betur samanhald í flokkinum og millum foreldrini

Diskotekið byrjar kl 20 og endar kl 23. Atgongumerki, sum fáast við dyrnar, kosta 60 kr. Tey vóna at síggja nógvan ungdóm, og eru øll úr elstu flokkunum í fólkaskúlunum og framhaldsdeildini vælkomin. Stuttligt hevði eisini verið at sæð ungdóm frá bygdunum, siga tey.

Tiltakið er eitt av fleiri, flokkurin hevur skipað og fer at skipa fyri. Í desember mánaði gjørdu tey m. a. brústsukur, sum tey seldu. Eisini hava tey savnað og selt fløskur. Umframt tiltøkini hava tey sett pening inn í nøkur ár, tó er enn nakað eftir at koma á mál, og fara tey væntandi at skipa fyri eini tveimum tiltøkum afturat áðrenn farið verður, siga tey í 7. b í Tórshavnar kommunuskúla.